Áðrenn Suzuka

# Kappingin fyri lið er enn víðopin

**Heimsmeistaraheitið fyri koyrarar varð avgjørt seinast í Brasilia, men enn er eingin avgerð fallin í kappingini fyri lið, og bæði Renault og McLaren-Mercedes ætla sær at stríðast fyri hesum**

*Niels Uni Dam*
*nielsuni@sosialurin.fo*

Á tíðindafundinum aftan á formel 1 koyringina í Brasilia segði tann nýggi heimsmeistarin í formel 1, Fernando Alonso, at avgerðin í kappingini um heimsmeistaraheitið gav honum fríðari teymar seinastu koyringarnar, og at nú fór hann at satsa eitt sindur meira. Hetta endurtekur hann hesa vikuna í samrøðu við almennu formel 1 heimasíðuna f1.com. Hann sigur, at nú fara hann og Renault liðfelagin Giancarlo Fisichella, at stríðast fyri at vinna heimsmeistaraheitið fyri lið.

Í somu koyring, sum Alonso tryggjaði sær heimsmeistaraheitið fyri koyrarar, misti Renault fyrstu ferð á árinum oddasessin í kappingini fyri lið til McLaren-Mercedes.

Hetta verður ein torfør uppgáva hjá Renault, tí McLaren-Mercedes hava havt betra bilin seinastu nógvu mánaðarnar, og Raikkonen og Montoya eru báðir í toppformi. Teir hava skifts um at vunnið seinastu fimm koyringarnar, og vit skulu aftur til 24. juli, fyri at finna seinastu ferð ein Renault koyrari vann.

### Nýggjur Honda

BAR-Honda kunngjørdi í vikuni at liðið eitur Honda frá og við næsta kappingarárið. Hetta merkir at British American Racing gevst í tí ítróttinum, ið liðið fyrstu ferð luttók í kappingarárið 2000. BAR byrjaði við ætlanum um at vinna av fyrstu byrjunarstøðu í fyrstu koyringini, og at gerast heimsmeistari fyrsta árið. Enn hevur liðið ongantíð vunnið nakað í formel 1, og eingin ivi er um, at ein sigur hevði komið væl við, hjá rasaraliðnum, ið hevur vunnið allar aðrar rasarakoyringar, har liðið hevur luttikið. Honda hava ein nýggjan motor til koyringina á heimabreytini, so vert er, at eygleiða hvussu koyringin fer at ganga fyri Button og Sato.

### Nýggjur Toyota

Toyota, ið eisini eru á heimabreytini á Suzuka, hava ein nógv broyttan bil við til hesa koyringina. Hetta er, sum skilst ein bilur, sum liggur sum grund fyri Toyota bilin næsta ár. Ralf Schumacher sigur við f1.com, at hesin bilur riggar munandi betur til hansara hátt at koyra enn ársins bilur hjá Toyota.



*Hóast Alonso er heimsmeistari í formel 1, ætlar hann at stríðast víðari fyri meistaraheitinum fyri lið.*

### Schumacher plagar at vinna

Michael Schumacher plagar at vinna á Suzuka, ikki færri enn seks ferðir hevur týskarin og sjeyfaldi heimsmeistarin tikið sigurin á hesi breytini. Av koyrarum, sum enn eru í formel 1, er tað umframt Schumacher einans Rubens Barrichello sum hevur vunnið á Suzuka. Rubens vann í fyrra árið.

## FAKTA

### Um japansku koyringina á Suzuka




Umferðir: 53
Breytarlongd: 5,807 km
Skjótast umferð: Rubens Barrichello 2003 (Ferrari)1 minutt 32,730 sekund
Longdin á koyringini: 307,573 km
Núverandi koyrarar sum hava vunnið á Suzuka: Michael Schumacher 1995, 1997 (Bennetton-Renault) 2000, 2001, 2002, 2004 (Ferrari), Rubens Barrichello 2003 (Ferrari)
Keldur: www.f1.com og www.forix.com

### HM fyri koyrarar

| | | |
|---|---|---|
| 1 | Fernando Alonso | 117 |
| 2 | Kimi Räikkönen | 96 |
| 3 | Michael Schumacher | 60 |
| - | Juan-Pablo Montoya | 60 |
| 5 | Giancarlo Fisichella | 45 |
| 6 | Jarno Trulli | 43 |
| 7 | Ralf Schumacher | 38 |
| - | Rubens Barrichello | 38 |
| 9 | Jenson Button | 32 |
| 10 | Mark Webber | 29 |

### HM fyri lið

| | | |
|---|---|---|
| 1 | McLaren-Mercedes | 164 |
| 2 | Renault F1 | 162 |
| 3 | Scuderia Ferrari | 98 |
| 4 | Toyota Racing | 81 |
| 5 | Williams-BMW | 59 |
| 6 | BAR Honda | 33 |
| 7 | Red Bull Cosworth | 27 |
| 8 | Sauber Petronas | 17 |
| 9 | Jordan Toyota | 12 |
| 10 | Minardi Cosworth | 7 |

# Japan elskar formel 1

**Japanar eru formel 1 fjepparar um ein háls, men enn hevur eingin japanari vunnið á heimabreytini. Besta japanska úrslitið á Suzuka er 3. plássið hjá Aguri Suzuki í 1990**

FORMEL 1

*Niels Uni Dam*
*nielsuni@sosialurin.fo*

Japan er eitt land har formel 1 koyrarar eru næstan líka stórar hetjur sum sumoglímarar. Síðan fyrstu japansku koyringina í 1976 hava 20 koyringar verið í Japan, 18 av hesum á Suzuka breytini og tvær á Mount Fuji breytini. Enn hevur eingin japanari vunnið í Japan, ella nakra aðrastaðni.

16 japanarar hava koyrt formel 1 gjøgnum tíðirnar, og einans tvær ferðir er ein av teimum endaður á sigurskamlinum. Hetta var fyrstu ferð í 1990 í júst Japan, tá Aguri Suzuki koyrdi sín Lola-Lambourgini av 9. byrjunarstøðu upp á triðja pláss. Aðru ferð var, tá Takuma Sato á Indianapolis breytini byrjaði á í triðju støðu og koyrdi sín BAR-Honda á mál í somu støðu.

Takuma Sato er við sínum 40 stigum í 49 koyringum tann japanarin, ið hevur fingið nógv flest stig í formel 1. Næstur honum er Saturo Nakajima, sum fekk 16 stig í 74 koyringum í árunum 1987-1991.

### Nógvar verksmiðjur

Meðan japanskir formel 1 koyrarar ikki hava sannført, so hava Honda motorar aftur fyri verið sera sannførandi, við 71 sigrum, og 4 sigrum undir heitinum Mugen-Honda, er Honda 4. mest vinnandi motorurin í formel 1 søguni. Eisini á dekk økinum hava japanar sannført, Bridgestone og systurfelagið Firestone hava vunnið tilsamans 144 ferðir. Tað er einans Goodyear, ið hevur megna at vunnið oftari.

### Reint Honda lið

Í vikuni gjørdist greitt at Honda hevur keypt British American Racing liðið, og at liðið í framtíðini verður eitt reint Honda lið. Samstundis hevur liðið givið japanska koyraranum Takuma Sato sekkin, og sett Rubens Barrichello at koyra við liðuna av Jenson Button. Hetta kann tykjast løgið. Men veruleikin er tann, at hóast Sato er besti japanski koyrarin nakrantíð, er hann slettis ikki serliga sannførandi. T.d. hevur liðfelagin Button í ár fingið 32 stig ímóti tí eina, sum Sato hevur fingið. Í fjør hevði Sato eitt betri ár og fekk 34 stig, men eisini hetta árið var Button væl betur við 85 stigum.

Sato arbeiðir í løtuni við at fáa sáttmála við okkurt annað lið. Hann hevur takkað nei til eitt starv sum royndarkoyrari hjá Honda. Tey flestu formel 1 setrini eru longu upptikin næsta kappingarár, og tí er hetta kanska seinasti møguleiki hjá Sato, at sannføra á heimabreytini. Samstundis er hetta eisini ein møguleiki at vísa ivasomum arbeiðsgevarum, at hann eigur at verða verandi í formel 1.

### Yamamoto avloysir Kiesa

Danski triðikoyrarin hjá Jordan-Toyota er ikki við hetta vikuskiftið, ístaðin er japanski Sakon Yamamoto triðikoyrari hjá liðnum hetta vikuskiftið. Gávuríki japanski koyrarin sleppur sostatt at royndarkoyra Jordan-Toyota bilin framman fyri nógvu japansku fjepparunum fríggjadagin. Hetta er óivað eitt tiltak, ið Jordan liðið ger fyri at tekkjast motorframleiðaranum Toyota.